Prixið er meira enn ein talentkapping

– Tað er sera týdningarmikið, at vit vísa okkara gestum tað besta, sum vit eiga av tónleiki í hesum landi, sigur Fróði Vestergaard, sum heitir á royndar bólkar og tónleikarar um at vera við í Prix Føroyum

PRIX
Eyðun Klakstein

Prix Føroyar er meira enn bara ein talentkapping. Tað slær samskiparin av Prix Føroyum, Fróði Vestergaard fast.

– Prix Føroyar er fyri allar tónleikarar, eisini teir sum eru etableraðir og fegnir vilja røkka út um landoddarnar, sigur hann.

– Vit bjóða nógvum útlendskum fjølmiðlafólki, festivalfyrireikarum, útgevarum og øðrum til finaluna í Prix Føroyum, og tí er tað sera týdningarmikið, at vit vísa okkara gestum tað besta, sum vit eiga av tónleiki í hesum landi.

Fróði Vestergaard heldur, at tað er ein góður møguleiki hjá øllum tónleikarum og bólkum at gera vart við seg í Prix Føroyum.

– Tað er gott, at nýggj talent koma fram gjøgnum Prix Føroyar, men tað er ikki einasta málið við kappingini. Vit vilja eisini virka fyri, at føroyskur tónleikur gerst kendari uttan fyri landoddarnar, sigur Fróði Vestergaard.

Fróði Vestergaard

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum,
at okkara elskaða mamma, omma,
langomma og vermóðir

Ellen Nielsen

Frederiksberg

einkja eftir Hans Nielsen, fyrr búsitandi í Klaksvík,
andaðist fríggjadagin 13. desember 2002,
84 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Samuelskirken,
Thorsgade 65, 2200 København N,
mikudagin 18. desember kl. 14.00.

Fyri tey avvarðandi

Myrna, Jens, Tinner, Finn, Helle og Marjun

Búmerki til umhvørvisátak í Havn

BÚMERKJAKAPPING
Tíðindaskriv

Komandi ár verður burturkastskipanin í Tórshavnar kommunu endurskoðað og broytt. Í framtíðini eru tvey lykla hugtøk: At skilja og at endurnýta.

Í fyrstu atløgu verður ein royndarinnsavning av pappíri og pappi frá vanligum húskjum sett í verk í fýra ymsum býarpørtum í Havn. Innsavningin skal geva neyðuga grundarlagið fyri, at ein innsavningar- og endurnýtsluskipan av pappíri og pappi frá øllum húskjum í kommununi kann setast í verk seinni komandi ár.

Í vár verður eitt nýmótans endurnýtsluplass tikið í nýtslu sunnan fyri Brennistøðina á Hjalla. Plássið verður karmur um eina virkna endurnýtsluskipan fyri einstaklingar og virkir. Burturkast skal latast inn á endurnýtsluplássið og skiljast eftir ávísum fyriskriftum. Tað skal tryggja, at vandamikið burturkast, m.a. PVC og trýstdýggjaður viður verður skilt frá vanliga burturkastinum umframt at virðismikið tilfeingi, m.a. pappír, papp og glas verður gagnnýtt í mest møguliga mun.

Harumframt verður arbeitt við øðrum verkætlanum innan skiljing og endurnýtslu.

Tórshavnar kommuna skipar í hesum sambandi fyri kapping um búmerki, sum skal eyðkenna og ímynda ætlaðu broytingarnar. Búmerkið skal nýtast í kunnandi tilfari, á rukspannum, bilum og bingjum v.m. Ein dómsnevnd verður sett at taka støðu til innkomnu uppskotini. Vinnandi búmerkið fær kr. 15.000,00 í virðisløn.